Lívdin
- í lívd hins hægsta

Juni 2009



# Fyrireiking til annað byggistig



*Byggistig tvey umfatar betongarbeiðið á grundøkinum við Vegin Langa*

Á samkomufundinum 12. mai varð kunnað um smávegis broytingar í tekningunum av nýggja bygninginum hjá Lívdini, sum eru gjørdar orsakað av samráðingum við brunamyndugleikarnar.

Ráðgevarafyritøkurnar Selmar Nielsen, LBF, Sofus M. Jakobsen, KJ Elráð og Steingrund Akustikk eru nú lidnar við prosjektering av byggistigi 2.

Avgerð er tikin um at biðja óheftan metingarmann um at ráðgeva Lívdini í sambandi við byggiharragóðkenning av prosjektinum.

Almenn lýsing um innbjóðing til undangóðkenning av arbeiðstakarum, ið skulu geva tilboð upp á betongarbeiðið, var í bløðunum síðst í mai. Ætlanin er, at útvaldir arbeiðstakarar fáa prosjekttilfarið sendandi síðst í juni. Licitatión verður týsdagin 25. august.

## Fyrigeving

Ein høvundur segði: “Vit eru lík dýrum, tá ið vit hevna; mest lík menniskjum, tá ið vit krevja líkarætt, og lík Gudi, tá ið vit fyrigeva. ”Fyrigeving er byrjanin til endan av nógvum av trupulleikum okkara. Men fyrigeving er eitt evni, sum er sera nógv misskilt, misbrúkt og mistulkað. Fyrigeving er ein tilgongd, sum krevur ómetaligan vísdóm, realistiskar tankar, stórt dirvi og bleytt hjarta. Komandi vikurnar fara vit gjøgnum versini í Róm. 12:16-21, og høvuðsevnið í hesum versum er, hvat vit skulu gera við tey, sum volda okkum sorg og pínu. ”Fyrigev og gloym” er kanska ikki tað, sum er bíbilsk fyrigeving. Kanska fer Guds vegleiðing um fyrigeving at gera okkum ovfarin. Komið og lurtið!



*Jógvan Zachariassen*

# Vinir í Lívdini

### Thom Cunningham talaði í Lívdini

Sunnudagin 17. mai vitjaðu Thom Cunningham, trúboðari í NTM, og konan Carolyn, í Lívdini. Tey vóru komin til Føroya at halda eitt skeið undir heitinum "Each One Reach One - Each One Teach One " á Zarepta. Skeiðið var frá mikudegnum 20. mai til sunnudagin 24. mai.



*Thom Cunningham talaði í Lívdini sunnudagin 17. mai*

Endamálið við skeiðnum var at eggja og búgva út trúgvandi til persónliga evangelisering og til at taka sær av nýfrelstum og læra tey - ein og ein. Carolyn og Thom Cunningham hava hildið hetta skeiðið í nógvum londum við góðum úrslitum.

### Regin Guttesen við nýggjari fløgu

Mikudagin 20. mai varð nýggja fløgan ”FJAKKARI” hjá Regini Guttesen presenterað á móttøku á Hotel Djurhuus í Havn.



*Regin Guttesen er komin út við nýggjari fløgu*

Tólv spildurnýggj løg eru á fløguni. Talan er um sangir við føroyskum tekstum, sum Regin, fyri stóran part, sjálvur hevur skrivað. Fløgan er spæld inn í Kris-Stuff Studio í Havn og Fix-n-Mix Studio í Danmark. Óli Poulsen hevur framleitt og ljóðblandað. Framleiðslustjóri var Jákup Zachariassen.

### Alterna næmingar vitjaðu í Lívdini

Sunnudagin 17. mai høvdu vit vitjan av 20 næmingum frá danska bíbliuskúlanum Alterna í Mariager, sum vitjaðu í Føroyum. Talan var um eitt ferðalag upp á umleið 60 fólk, sum vóru í Føroyum í eina viku. Tey vitjaðu í Føroyum frá 14. til 21. mai og vóru t.d. á Zarepta, har tey gjørdu ymiskt praktiskt arbeiði, umframt at tey eisini vóru í Suðuroy, Klaksvík, Eysturoy og í Kelduni í Skálafirði. Næmingarnir luttóku eisini í Várfestini sunnudagin 17. mai, og setta tey sín serliga dám á dagin.



*Næmingar frá Alterna vitjaðu Lívdina sunnudagin 17. mai*

## Várfest í Havn

Várfest var í miðbýnum í Havn sunnudagin 17. mai. Talan var um eitt tiltak, sum fleiri samkomur í Havn stóðu saman um. Tiltakið byrjaði við skrúðgongu frá Frelsunarherinum og oman á Vaglið, har Heðin Mortensen, borgarstjóri, setti Várfestina. Síðani vóru fleiri av teimum kendu søgunum í Bíbliuni framførdar á smáum pallum runt um í miðbýnum. Harumframt var eisini ein uppboðssøla av málningum hjá fleiri føroyskum listafólkum. Avlopið av uppboðssøluni fór til Tilhaldið í Tórsgøtu.




## KLH 50 ár

Kristiligt Lurtara- og Hyggjara-felag (KLH) er 50 ár. Felagið varð stovnað 6. apríl 1959.

Endamálið við KLH er at virka fyri kristiligum sendingum í almenna kringvarpinum, í útvarpi og sjónvarpi, sum t.d. við gudstænastum, kristiligum fundum, andaktum, kristiligum sangi og tónleiki.

KLH hevur sent faldarar út til kirkjur og samkomur í Føroyum um at stuðla felags-skapinum og tí, hann stendur fyri. Felagið hevur 1400 limir. Faldarar hjá KLH eru á kunningarborðinum hjá Lívdini. Heimasíðan er: www.klh.fo

## Tillukku við barninum

15. mai fingu Durita og Heini Egholm í Havn eina dóttur. Hon var 48 cm long og vigaði 3300 gr.



*Modelmynd*

# Tiltøk

## Tiltøk á Brekku 3

(bygningurin aftan fyri MBM)

**Undirvísing og bøn eru týskvøld kl. 20.**

| | |
|---|---|
| 2. juni | Bønarløta |
| 9. juni | Húsbólkar |
| 16. juni | Kall og visiónir (Valdemar Lützen) |
| 23. juni | Prát um hvat vit lærdu av taluni sunnudagin (J. Zachariassen) |
| 30. juni | Húsbólkar |

## Verið við til at stuðla

Við fastari mánaðarligari flyting til byggigrunnin hjá Lívdini, konto nr. 9181-530.707-6 í Eik Banka, ber til at stuðla byggingini av nýggja bygninginum við Vegin Langa. Flytingarskjøl eru á kunningarborðinum í Lívdini sunnudagar.




## Mammubólkurin í summarfrí



*Mammubólkurin á Brekku*

Fríggjadagin 29. mai var mammubólkurin á Brekku saman fyri seinastu ferð áðrenn summarsteðgin. Lýst verður, nær byrjað verður aftur - einaferð í september. Áhugað eru vælkomin at seta seg í samband við Lív Clementsen á tel. 516714 / 316714.

## Ungdómsheimasíða í nýggjum hami




Heimasíðan hjá ungdóminum í Lívdini, www.ung.livdin.fo, hevur fingið eitt nýtt og uppfrískað snið.

## Skráin fyri møtini í Hoyvíkar skúla

### Sunnudagin 7. juni

| | |
|---|---|
| Familjumøti kl. 10.30: | *Talarar: Ung Lív* |
| Tilbiðjan og læra kl. 12.00: | *Evni: Rómbrævið 12: 14-16* |
| | *Talari: Jógvan Zachariassen* |
| | ** Innsavning til nýggja bygningin* |


Jógvan

### Sunnudagin 14. juni

| | |
|---|---|
| Familjumøti kl. 10.30: | *Evni: Vitnisburður* |
| | *Talari: Ruth Lützen* |
| Tilbiðjan og læra kl. 12.00: | *Evni: Rómbrævið 12: 17-19* |
| | *Talari: Jógvan Zachariassen* |
| | ** Bøn fyri børnum* |


Ruth

### Sunnudagin 21. juni

| | |
|---|---|
| Familjumøti kl. 10.30: | *Evni: Opið evni* |
| Tilbiðjan og læra kl. 12.00: | *Evni: Rómbrævið 12: 20-21* |
| | *Talari: Jógvan Zachariassen* |


Wilson

### Sunnudagin 28. juni

| | |
|---|---|
| Familjumøti kl. 10.30: | *Evni: Opið evni* |
| | *Talari: Ejler Eysturtún* |
| Tilbiðjan og læra kl. 12.00: | *Evni: Opið evni* |
| | *Talari: Wilson Goeda* |

** Fyrivarni verður tikið fyri broytingum í skránni*

*Útgevari: Samkoman Lívdin – www.livdin.fo · Ábyrgd: Magnus Gunnarsson · Teldupostur: faldarin@livdin.fo*